Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Eyðgunn Samuelsen, løgtingskvinna

Svarari: Jóhan Christiansen, landsstýrismaður í fiskivinnu- og samferðslumálum

Evni: Snarbussurin millum Klaksvík og Tórshavn

Spurningar:

1) Nær kann væntast at túratalið hjá leið 401 úr Klaksvík til Havnar verður økt, so koyrt verður oftari gjøgnum Eysturoyartunnilin?
2) Kann væntast, at leið 400 verður endurskoðað?

Viðmerkingar:
Tað er ein stórur bági fyri fólk í Norðoyggjum og Eysturoy, ið ynskja at nýta bussleiðina til Havnar, at so fáir túrar eru millum Tórshavn og Klaksvík gjøgnum Eysturoyartunnilin. Gamla rutan, sum verður røkt av leið 400, tekur alt ov langa tíð, um fólk skulu til arbeiðis ella í skúla.

Í sendingini Breddin í vikuni um fráfall á Setrinum kom fram, at helmingurin av teimum lesandi eru av bygd, og 70 % brúka bil í samband við at koma til Setrið. Grundgevingin var, at busssambandið er so ósmidligt, at tað ber illa til at brúka bussin. Hetta er ein stórur fíggjarligur bági fyri tey lesandi, tí tað er munandi dýrari at hava bil heldur enn at gera brúk av bussleiðini. Fíggjarliga byrðan av býli og mangulin á lestrarbýli ger, at nógv lesandi búgva úti um landið, og hjá teimum er dýrur flutningur steinur omaná byrðu.

Landstýrismaðurin hevur áður upplýst, at nýggja planleggingarskipanin, ið fer at gera tað munandi lættari at tillaga og broyta ferðaætlanir, verður klár at taka í nýtslu tíðliga í 2025. Eisini hevur landsstýrismaðurin upplýst, at tað eru ítøkiligar ætlanir um at gera tillagingar á leið 401 millum Tórshavn og Klaksvík umvegis Eysturoyartunnilin.
Um og tá hesar tillagingar við leið 401 verða gjørdar, kann væntast, at hesar eisini føra við sær broytingar á leið 400. Leið 400 hevur í nógv ár verið mest nýtta farleiðin, og fyri at hon framhaldandi skal verða tað, er neyðugt at umskipa og dagføra hesa leið.
Fyri at fáa greiði á, nær tænastan verður umløgd og betrað, verða hesir spurningar settir.

Á Løgtingi, 31. mars 2025

Eyðgunn Samuelsen